Slyul E

# ÍTRÓTTARSAMBAND FYRI BREKAÐ
THE FAROESE SPORT ORGANISATION FOR DISABLED

FÖROYAR ÍSB

Tel. +298 317579
Mobil +298 216760
Fax +298 312421
P.O. Box 223, Gundadalur
FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
e-mail: isb@post.olivant.fo
www.isb.fo

Tórshavn 11. okt. 2007

Til
Fíggjarnevnd Føroya Løgtings

Annfinn Kalsberg
Vilhelm Johannesen
Lisbeth L. Petersen
Kaj Leo Johannesen
Páll á Reynatúgvu
Karsten Hansen
Kári P. Højgaard

**Viðvíkjandi stuðuli til norðurlendska skrivstovu í Føroyum**

ÍSB hevur verið limur í norðurlendska samstarvinum Nord HIF síðan 1980. Londini skiftast um leiðsluna av hesum felagsskapi. Nakrar ferðir hesi árini hevur staðið Føroyum í boði at taka við norðurlendsku skrivstovuni, men vit hava borið okkum undan vegna vantandi umsitingarligar royndir.

Nú stóð okkum aftur hesin týðandi parturin av norðurlendska samstarvinum í boði. Men áðrenn vit tóku av, settu vit okkum í samband við mentamálaráðið og greiddu frá støðuni. Vit boðaðu frá, at neyðugt var við kr. 100.000 til eitt hálvtíðar starv í hesum sambandi.

Frá MMR fingu vit at vita, at har skuldi alt verða gjørt til tess at fáa upphæddina við í fíggjarlógina fyri 2008. Vit vórðu sera væl móttikin og fatanin, vit fingu var tann, at tað mundi fara at ganga!

Hetta var okkara varliga ynski - 100 tús. kr. - til setan av skrivara hálva tíð at taka sær av norðurlendsku skrivstovuni komandi trý árini!

Men á fíggjarlógaruppskotinum stendur ikki eitt oyra!!

Tað harmar okkum tí almikið enn einaferð at fara neyðarsligu og eyðmýkjandi gongdina til grannar okkara og siga, at í Føroyum er eingin vilji til at seta neyðuga peningin av á landsins fíggjarlóg til eitt sjálvsagt norðurlendskt mál teimum brekaðu at frama! Vit senda bara drunnin víðari og siga sum vit plaga, at vit eru so fá og smá!!

Er hetta ikki skomm fyri okkum føroyingar bara at spæla við, men ikki vilja gjalda gildið?

Eftir jaliga svarið frá mentamálaráðnum boðaðu vit frá á fundi í Nord HIF, sum varð hildin í Finnlandi í avgust í ár, og har ið endaliga avgerðin skuldi falla, at vit tóku av tilboðnum um at standa fyri norðurlendsku skrivstovuni.

Men nú standa vit spyrjandi : Verður kortini neyðugt at fara til grannarnar fyri vestan og heita á teir, um at taka á seg ábyrgdina, sum annars varð løgd á okkum??

Vit vóna tað ikki!

Tí heita vit inniliga á tykkum í fíggjarnevndini, um at fáa skipað so fyri, at kr. 100.000 til nevnda endamál kemur við í fíggjarlógina, sum tit hava til viðgerðar í løtuni.

Vinaliga

v. ÍSB

Jøgvan Jensen          Johan Samuelsen          Jón á Steig



LÍV FØROYA LÍVSTRYGGING
SKEMMAN
høvuðsstuðlar hjá ÍSB